

TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL L/B — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NE 499 **Km:** 128.000
**Árgangur:** 01.05.01

**Kr. 85.000,-**



RENAULT SCENIC 1,6

**Skrásetingarnr:** RK 422 **Km:** 70.000
**Árgangur:** 26.04.01

**Kr. 75.000,-**



NISSAN ALMERA 1,8 SEDAN — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SK 212 **Km:** 82.000
**Árgangur:** 01.04.03

**Kr. 115.000,-**



HONDA ACCORD 1,6

**Skrásetingarnr:** PT 777 **Km:** 114.000
**Árgangur:** 26.01.01

**Kr. 78.000,-**



SKODA FABIA 1,4

**Skrásetingarnr:** EL 476 **Km:** 90.000
**Árgangur:** 27.06.02

**Kr. 65.000,-**



NISSAN TERRANO 3,0 VØRUBILUR — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** KL 207 **Km:** 80.000
**Árgangur:** 25.06.03

**Kr. 148.000,-**



TOYOTA AVENSIS 1,8 SEDAN

**Skrásetingarnr:** MK 657 **Km:** 129.000
**Árgangur:** 20.01.99

**Kr. 65.000,-**



PEUGEOT 406 2,0 HDI — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HV 532 **Km:** 183.000
**Árgangur:** 17.01.00

**Kr. 98.000,-**



FORD FOCUS TDI GHIA

**Skrásetingarnr:** HP 999 **Km:** 110.000
**Árgangur:** 07.12.00

**Kr. 75.000,-**



TOYOTA AVENSIS 2,2 D-CAT STW. 177 hk — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** HJ 563 **Km:** 59.000
**Árgangur:** 22.05.06

**Kr. 295.000,-**

Fyrivarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum - landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Konsertrøð við Biedermeier-Trio

KONSERT

Konsertir vera í døgunum 30. oktober til 4. november kring landið við Biedermeier Trio, mannað við Katju Volovelskaja á floytu, Nikolaos Kapnas á fjól og Bo Isholm á guitar. Teir fara at framføra tríggjar konsertir. Konsertin 4. november í Listaskálanum er fyri innbodnar gestir úr Listasavninum, Konsertfelagnum og Norrønu Felagnum. Hinar báðar í Pakkhúsinum í Bø og í Oyndarfjaðrar kirkju eru almennar.

Biedermeier Trio er er eitt rættuliga nýtt framtak í føroyskum tónleikalívi. Hetta er ein lítil, klassiskur kamarbólkur, sum spælir upá floytu, brats og gittara. Hesin blandingur av ljóðførum var ógvuliga væl lýddur sum serenadutrio á døgum Beethovens og Schuberts.

Katja Volovelskaja á floytu er fødd í St. Pætursborg. Hon fekk sína útbúgving í tónlistaskúlanum í St. Pætursborg og Tromsø, umframt at hon hevur lisið kamartónleik í Weimar. Hon hevur síðani 1997 verið floytulærari í Føroya Musikkskúla og spælt við Føroya Symphoniorkestri.

Nikolaos Kapnas á brats er føddur í Tasjkent. Sína útbygving fekk hann á Ríkistónlistaháskúlanum í Thessaloniki og hevur hann lisið víðari í Antwerpen og Brússel. Áðrenn hann í 1998 kom sum lærari á Tórshavnar Musikkskúla hevur hann havt starv hjá BRTN í Brússel og verið solistur og kamartónleikari nóvastaðni í Evropa.

Bo Isholm á guitarra er føddur í Keypmannahavn. Hann er útbúgvin í Kongliga Danska Tónlistaháskúlanum og Early Music Centre í London. Hann hevur starvast sum fríyrkistónleikari, lærari og musikkskúlaleiðari í Danmark, Svøríki, Týsklandi, Niðurlondum og Fraklandi. Síðani 1996 hevur hann arbeitt á Føroya Musikkskúlanum og tók yvir í 2003 sum leiðari í Tórshavnar Musikkskúla.

Biedermeier – Trio fer at framføra verk eftir Bach, Diabelli og Louis Glass.



Konsertirnar verða: Týsdagin 30. oktober kl.19.30 í Pakkhúsinum í Bø, Fríggjadagin 2. november kl. 19.30 í Oyndarfjarðar kirkju, sunnudagin 4. november kl.16.00 fyri innbodnar gestir í Listasavni Føroya.

Tað er konsertfelagið sum skipar fyri konsertrøðini og vilja tey eisini vísa á nýggju heimasíðuna hjá konsertfelagnum: www.konsertfelag.net

Øll eru hjartaliga vælkomin til konsertirnar.


